# Ein aldrandi heimur

SÍMUN PAULI JACOBSEN



Núverandi heimur má vera ógvuliga gamal. Tað stendur í bíbliuni, at Gud skapti heimin í upphavi - í fyrstuni - i Begyndelsen.

Trúliga hevur hann staðið og tikið ímóti øllum teimum, sum skuldu búleikast her, verið seg menniskju, kríatúr, fuglur, fiskur, hvalur og so framvegis. Øld eftir øld, í milliónir av árum.

Men nú tykjast kreftir heimsins at ganga undan. Í myndatalu kunnu vit siga, at hann - heimurin - er komin væl inn í pensiónsaldur.

Hvussu leingi hann - heimurin - stendur, veit ongin av okkum.

Partvís av dálking av menniskjans ávum, verið seg í luftini, á sjónum, á landi við útláti av gassi v. m. eru kreftir heimsins farnar at ganga undan. Veðurlagsbroytingar eru bert eittans dømi av mongum, at so er.

Men tíbetur, hetta er ikki hin seinasti heimur. Tá hann einaferð ikki verður meira, fer Gud at skapa ein nýggjan heim, ein ungan, óspiltan nýggjan heim.

Ein vinur hjá Mark Twain segði einaferð: »Eg eri stúrin. Heimurin gongur móti enda sínum.

»Legg tú einki í tað«, svaraði tann víðagitni humoristurin. »Vit klára okkum nokk uttan hann«.

Ikki er vist, at Mark Twain var greiður yvir tað, men hann segði sannleikan. Vit kunnu klára okkum uttan verandi heimin, tí Gud hevur sagt, at hann vil skapa ein nýggjan heim.

Í 1860 segði franski evnafrøðingurin Marcelin Berthelot: »um hundrað ár fer menniskjað við vísindaligu framtøkum sínum í alis- og evnafrøði at vita, hvat atomið er. Eg eri sannførdur um, at tá ið vísindafólk eru komin hagartil, so fer Gud at koma niður á jørðina við lyklum sínum og siga við mannaættina: »Mínir harrar, nú er afturlatingartíð«.

Alt meðan heimsins mætastu menn ferðaðust úr einum landi í annað til tessa at fáa heimsins lond at seta í verk tiltøk til tess at steðga verandi veðurlagsbroytingum er ein fíggjar- og búskaparkreppa á veg og tykist hon raka flestu av heimins londum.

USA og Ísland tykjast vera harðast rakt.

Serstakliga Ísland keypti og stovnsetti eitt ótal av bankum og forrætningum í einum landi fyri og øðrum eftir. Eingin skilti hetta, og menn roknaðu við, at hetta fór at koma aftur um brekku í dýrum dómi. Og so var. Nú er synd í íslendingum.

Ongatíð havi eg hildið tað vera sunt, at arbeiða soleiðis við læntum pengi við at keypa partabrøv, har menn kunnu vinna milliónir eftir einum degi, meðan aðrir kunnu missa milliónir somuleiðis eftir einum degi.

Eg haldi ikki, at hetta er gott. Ongatíð havi eg sett pening í keyp av partabrøvum við tí fyri eyga at gerast ríkur á henda hátt. Eg havi altíð hildið, at best er at vera nøgdur, um ein hevur nokk til dagsins breyð. Bíbilsku orðini »í dit ansigts sved skal du æde dit brød« mugu vera frægastu hyggjuráðini í hesum heimi.

Úttalilsi frá búskaparfrøðingum um, at tað einans er ein fíggjarkreppa og ikki nøkur búskaparkreppa, sum er ávegis til flestu av heimsins londum, kann kjakast um. Mín hugsan er tann, at eingin veit enn, hvussu umfatandi kreppan verður, tí tað hendir nakað nýtt hvønn einasta dag. So seint sum fyri 2-3 døgum síðani hoyrdist, at ein stórur franskur banki hevði mist millum 4 og 5 milliardir kr. Og tann pástandur, at íslendska kreppan ikki kemur at fáa fylgir fyri Føroyar, gevi eg lítið fyri.

Annars fari eg at takka donsku stjórnini fyri, at trygdarnet er spent fyri allan innskotspening í føroyskum peningastovnum.

Tað er ein ávísur tryggleiki at vera saman við einum størri landi. Tað sóu vit eisini undir kreppuni í nítiárunum, tá øll tann føroyska uttanlandsskuldin uppá fleiri milliardir varð umbýtt við eitt danskt statslán uppá 20 ár við 5% í rentu. Harumframt fingu føroyingar goldið 900 milliónir kr. í samband við umbýti av Føroya Banka.

Eisini vórðu 500 milliónir kr. fastfrystar og skuldu føroyingar einans gjalda henda pening, um olja varð funnin við Føroyar.

# Guð var trummusláari, og Jesuspápi spældi upp á ein "feitan" bass

FRITS JOHANNESEN



Ja, soleiðis var tað kanska frá upphavsins morgni, tá ið Várharra hevði skapað himmal og jørð. Tá settu feðgarnir báðir seg niðurat, tóku ljóðførini fram og góvu ljóð, so tað rungaði eftir í undir himmalskum stjørnulindum og stjørnugrúsi. Fjallamálið frá hesari løtu doyði burtur fyri milliónum av árum síðani, men í Kringvarpinum livir hetta ralandi ljóð enn. Tá ið tú tendrar fyri útvarpinum á morgni at lurta eftir morgunlestrinum, fært tú eina trummu og ein feitan bass í heysin. Al oftast er tað soleiðis, men treyðugt so, onkuntíð stingur seg upp eitt hóvligt lag, sum spekir sinnið. Tá kennir tú á tær eina friðarliga gongd, sum nertir við hugsanna um eina kyrru, sum stendur fyri – upp undir eina løtu, sum átti at verið ein lestur, andakt (meditatión) fyri alra føroyinga.

**Skjaldur**
Tað hevur mangan verið víst á, at hóvlig løg spekja sinnið . Tey eldru minnast væl hugtakið at sita skýming. Dagsins verk var komið enda. Nú var dagsetur. Myrkrið setti seg í húsaveggir, fjallagreinir og undir bitarnar. Nú skuldi sálin hava eina hvíld. Onkur tók eitt barn á knøini - knuggaði tí , murraði og sang kanska eitt skjaldur . Eitt slíkt lag er eitt fimmtó nalag(pentatoniskt), sum kyrrar barnasinnið. Barnið kom í hvíld, áðrenn tað fór niður ( áðrenn tað fór til songar). Hetta var ein meditatión, sum meg minnist frá mínum barnaárum.

**Kvirran**
Tað tykist mær, at vit eru so rædd fyri kvirruni og gerast bangin, tá ið friðurin fellur á okkum. Útvarpsfólkini skrála og rópa í útvarpinum, tá ið t. d. fótbólturin er á skránni, og so kemur tann buldrandi trumman sum ein hvirluvindur aftaná. Eg ivist onga løtu í, at fólk halda hetta vera í lagi, men í mínari verð hoyrir hetta skról ikki heima í einum "Public Service" hugtaki. Tað ringasta av øllum, hetta skerandi róp er í tí rungandi trummuni og tí tunga bassinum upp undir ein lestur. Well, tú kanst sløkkja fyri lurtinum, sum mong fólk eisini gera. Tað finnast so mong hóvlig løg í ymsum líki, sum nýtt kundu verið bæði fyri og aftan á morgunlesturin. Hetta spekir sinnið, og tað sømir seg fyri fólk og stovn, sum goyma at einum mentanaráki, at tey tóku friðin til sín....... og ikki buldur og brak.

**Sálmasangurin**
Haldi eisini, at sálmsangurin kundi verið betri. Sálmarnir eru góðir, men tað hevði heldur ikki verið av leið, at onkrir teirra vórðu latnir í nýggj løg. Lestrarnir eru í lagi. Hvi ikki gera nýggjar upptøkur við fólki, ið hava ein ávísan ljóm í røddini, sum kundi lyft sálmin upp hagar, har hann eigur at verða?

Nei, kanska var tað so, at Guð spældi upp á ein "feitan" bass og Jesuspápi upp á trummur.

# Um aftaru og fremru stong

HILMAR JAN HANSEN



Kristin Poulsen í Fuglafirði hevur í vikuni áhugavert lesarabræv um fjølmiðlamál, har hann eitt nú undrast á okkurt av tí, sum sagt verður í útvarpsfrásagnum frá ítrótti. Millum annað spyr hann um nakað, hann sigur meg bera fram øðrvísi enn hinir frásøgumenninir, og eg vil eftir besta førimuni royna at svara.

Í lesarabrævinum skrivar Kristin soleiðis: »Eg kundi hugsað mær at spurt Hilmar Jan Hansen, hvør stólpi er aftari, tí er annar aftari enn hin, so átti hann at verið fluttur! Hví ikki siga, sum hinir frásøgumenninir, handari stólpi og næsti stólpi?«

Fyrst undrist eg á, at orðið stólpi verður brúkt, tí – sum flestallir føroyingar – sigi eg stong. Í mínari verð hevur málið tvær stengur, tveir tríkantar og ein yvirleggjara. Stólpi er ikki nakað, eg brúki í vanligari útvarping, tíansheldur í vanligari talu.

Havi tó onkra hendinga ferð brúkt orðið stólpi, og tá hevur tað gjarna verið eitt slag av endurgeving eftir Árna Gregersen, sum segði »stólpa út og stólpa inn« í einum av fyrstu altjóða skrásettu landsdystunum hjá fótbóltslandsliðnum.

Hetta er annars beinleiðis umsett frá tí danska »stolpe ud og stolpe ind«, sum danskarar brúka dúgliga. Sjálvur haldi eg eisini, at orðið stólpi ljóðar fremmant í fótbóltshøpi, tí orðið stong er nógv snøggari og – eftir mínum tykki – eisini rættari.

Skal í hesum viðfangi eisini viðganga, at eg ivaleyst eisini onkuntíð havi nevnt »stólparótina«, sum ikki er minni danskt, heldur enn føroyskt. Nú er kappingarárið í fótbólti skjótt av á hesum sinni, men tað má eg royna at leggja av, tí eg vil ikki ganga undan við at seta stólpa í staðin fyri stong!

Men lat tað bara fara, tí spurningurin hjá Kristini snýr seg fyrst og fremst um hetta við at siga »aftaru« og »fremru« um stengurnar, heldur enn at siga »næstu« og »handaru«.

Til tað er at siga, at fremsta uppgávan hjá okkum frásøgufólkum er at vera eygu hjá teimum, ið lurta og ikki síggja dystin. Og hóast vit ofta gloyma at siga tað, so kann tað jú vera lurtaranum til stóra hjálp, um hann eitt nú veit, at nú spælir annað liðið ímóti norðara málinum og hitt ímóti syðra málinum.

Tað sama er við »aftaru« og »fremru« stong, sum eg vil lýsa við hesum dømi: Hevur annað liðið eitt hornaspark í vinstru síðu, so kann lurtarin gera sær eina nógv greiðari mynd av, hvar menn og bóltur eru, um hann fær at vita, at ein spælari skallar bóltin í málið »við fremru stong«, enn um eg segði »við næstu stong«.

Í beinleiðis frásøgn í ítrótti henda tingini so mikið skjótt, at skalt tú fara at blaða í orðabókini, meðan sagt verður frá fyrsta málinum í einum dysti, kunnu skjótt tvey mál vera komin aftrat, áðrenn tú hevur funnið ið rætta orðið. Tí kemur sjálvandi eisini fyri, at okkurt fer eftir skeivum enda, tí stundir ikki eru at venda øllum, áðrenn tað fer út.

Men so er tó ikki við »aftaru« ella »fremru« stong, ið bert ørkymlar lurtaran, um hon nú eisini skal flytast. Ikki fyrr enn eg fái eina fullgóða grundgeving, síggi eg orsøk til at siga annað. Spurningurin hjá Kristini hevði neyvan heldur verið settur, var tað ikki júst tað, at hann jú skilti munin…

So vil eg at enda leggja eitt aftrat, sum eg haldi hava alstóran týdning, tá talan er um málbrúk: Tað má altíð vera høvuðsendamálið, at tey, sum taka ímóti, skilja tað, ið verður borið fram. Sjálvandi skal vandast um málið, men ikki má gloymast, at endamálið við tí er samskifti og einki annað!

E.S. Annars takk fyri føgru orðini!